# Tvær nýggjar

Higartil eru bert tvær nýggjar motorsúkklur keyptar í Føroyum í ár. Hans J. Hermansen hevur keypt tvær Suzuki GS500, sum hann skal brúka til koyriskúlan hjá sær.

At bert tvær nýggjar motorsúkklur eru keyptar higartil í 2005, merkir ikki at áhugin fyri tveyhjólaðu jarnhestunum er minkaður. Høvuðsorsøkin til lítlu søluna í ár er helst, at prísurin verður minkaður munandi næsta ár, tá tollurin verður broyttur. Tískil bíða fólk við at ogna sær nýggjar motorsúkklur. Ein motorsúkkla, sum í dag til dømis kostar 91.000 krónur, fer í januar 2006 at kosta minni enn 70.000 krónur.

Fólk kunnu taka koyrikort til motorsúkklu í øllum teimum stóru oyggjunum í Føroyum, og nú er enn ein koyriskúli, sum bjóðar koyrikort til motorsúkklu. Koyriskúlin hjá Hans J. Hermansen hevur tikið teir fyrstu næmingarnar inn, og hesir fáa koyrikort til tær tveyhjólaðu um nakrar vikur. Teir gott tjúgu næmingarnir sleppa at royna seg á spildurnýggjum Suzukisúkklum við 47 hestum.

- Hetta eru tvær flottar súkklur, og tær eru góðar at koyra. Tú kanst spyrja, hví eg ikki bíði við at keypa, tá motorsúkklurnar gerast bíligari. Orsøkin er, at eftirspurningurin eftir motorsúkklukoyrikorti er so mikið stórur, at tað er skilabest at byrja sum skjótast. So havi eg fingið gongd á, tá motorsúkklurnar gerast bíligari í januar, og so hevur koyriskúlin øll tilboðini til næmingarnar, sigur Hans J. Hermansen frá Koyriskúlanum.

Tað kostar í dag einar fimm túsund krónur at taka koyrikort til motorsúkklu á teimum ymsu skúlunum kring landið.

**-hkm**



*Tað er Anders Berg frá MC Søluni, sum hevur selt tær fyrstu nýggju motorsúkklurnar í Føroyum í ár. Eigarin av teimum nýggjastu motorsúkklunum í Føroyum eitur Hans J. Hermansen*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið hósdagin og fríggjadagin:**
Fleyr til gul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 15 og 19 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av norði og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Sunnudagin upp í stívt andøvsgul og møguliga ælingur. Hitin millum 13 og 17 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 15 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 13 |
| Ammassalik | 14 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 23 |
| Tromsø | 19 |
| Bergen | 20 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 32 |
| Malorca | 29 |
| Athen | -- |
| Malta | 31 |
| Tunis | 41 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | 15 |
| New York | 32 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 997 hPa. vestan fyri Føroyar fer móti Suður-Noreg og brúgvalagið haðani til havið eystan fyri Føroyar fer í útsynning.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Suður-Skandinavia stendur mestsum í stað. Hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum breiðir seg í landsynning.




## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/7 kl. 06⁰⁰– 19/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,8°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 25,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,3 mm – mált frá 18/7 kl. 06⁰⁰– 19/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 43,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

14. juli Fyrra kvarter
21. juli Fullmáni/mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. Juli | 06.10 | 18.40 | 05.10 | 17.40 | 05.25 | 17.55 | 08.10 | 20.40 | 09.10 | 21.40 | 04.25 | 16.55 | 03.25 | 15.55 | 06.25 | 18.55 | 07.25 | 19.55 | 05.55 | 18.25 | 07.10 | 19.40 |
| 21. Juli | 07.10 | 19.41 | 06.10 | 18.41 | 06.25 | 18.56 | 09.10 | 21.41 | 10.10 | 22.41 | 05.25 | 17.56 | 04.25 | 16.56 | 07.25 | 19.56 | 08.25 | 20.56 | 06.55 | 19.26 | 08.10 | 20.41 |
| 22. Juli | 08.12 | 20.40 | 07.12 | 19.40 | 07.27 | 19.55 | 10.12 | 22.40 | 11.12 | 23.40 | 06.27 | 18.55 | 05.27 | 17.55 | 08.27 | 20.55 | 09.27 | 21.55 | 07.57 | 20.25 | 09.12 | 21.40 |
| 23. Juli | 09.09 | 21.35 | 08.09 | 20.35 | 08.24 | 20.50 | 11.09 | 23.35 | - | 12.09 | 07.24 | 19.50 | 06.24 | 18.50 | 09.24 | 21.50 | 10.24 | 22.50 | 08.54 | 21.20 | 10.09 | 22.35 |
| 24. Juli | 10.01 | 22.25 | 09.01 | 21.25 | 09.16 | 21.40 | - | 12.01 | 00.35 | 13.01 | 08.16 | 20.40 | 07.16 | 19.40 | 10.16 | 22.40 | 11.16 | 23.40 | 09.46 | 22.10 | 11.01 | 23.25 |

Sosialurin

5 707265 100036 >